# Ikki so galin



*Finnur Jensen sum Torbjørn á bukkuni*
*Mynd: Jens K. Vang*

**Sjónvarp Føroya fær eitt væl uppiborið spark fyri sítt pínliga úrslit á Oyggjaleikunum, og ein stórur partur av býráðslimunum í Havn verða úrlætnir, tó ikki so nógv sum eks-mentamálaráðharrin, í Ólavsøkukabarettini 2001, sum slett ikki er so galin**

UMRØÐA
*Rúnar Reistrup*

Nógv fólk fáa eitt traðk yvir tærnar, nøkur eru harðari enn onnur, og ikki øll eru so væl meint, so fólkini handan ólavsøkukabarettina í ár skulu nokk fáa okkurt briksl við á vegnum frá teimum, ið verða meinast rakt.

Men tað er stuttligt. Tað er stuttligt hjá øðrum at flenna eftir at onkur verður gjørdur til láturs, og tað er í suttum tað, sum ein ólavsøkukabarett snýr seg um. Eisini tann í ár.

Ein stórur partur av skettjunum í henni taka støði í ávísum alment kendum persónum. Talan er í flestu av førunum um persónar, sum ikki beinleiðis hava gjørt nakað býtt ella skeivt, men sum kortini verða gjørdir so dyggiliga til láturs.

## Næstan synd

Ein ávís sjónvarpskvinna fær so nógv oman yvir seg, at tað næstan er synd, og øðrum hevur man eisini hug at taka synd í, tí ikki kann sigast at kabarettin sparir krútið.

Nú vit eru við sjónvarp, so fær Sjónvarp Føroya eitt væl uppiborið spark í dintilin við einari beinraknari parodi upp á føroyskt oyggjaleikasjónvarp ella »tærnakrimpavarp«, sum ein viðmerkjari kallaði tað. Men síðan verður trongstædda almenna sjónvarpið sparkað liggjandi nakrar ferðir, og tá verður tað kanska í so stuttligt.

## Hugskot á pallinum

Ólavsøkuabarettin er nokkso lang í ár. Hálvan annan tíma ella so er lív á pallinum, og hesa tíðina nær kabarettin at koma ígjøgnum sera nógv evnir, tí skettjurnar eru stuttar og nógvar.

Stuttar skettsjur virka ofta best, men í kabarettini eru eisini skettsjur, sum eru ov stuttar og kubbutar. Hesar bera brá av at vera ov lítið gjøgnumarbeiddar, og okkurt kundi bent á, at kabaretfólkið hevur gloypt um ein dekan ov stóran bita. Tey góðu hugskotini tróta ikki, men summar skettsjur fella til jarðar tí hugskotini ikki eru ment til skettjur og tí koma á pallin sum - ja, hugskot.

## Ungur kabaretthópur

Kabarettin í ár verður gjørd av seks ungum fólkum, harav bara tey bæði Turpin Napoleon Djurhuus og Sissal Olafsdóttir Frisdahl eru sædd í ólavsøkukabaretthøpi áður. Gutti Winther og Elisabeth Skarðhamar Olsen hava eisini verið at sæð sum sjónleikarar áður, meðan Finnur Jensen og Pætur Dahl eru púra feskir. Men teir smæðast avgjørt ikki burtur.

Hjá Pæturi Dahl lukkast tað serliga væl at eftirlíkna fólki í verumáta og kropsburði, og serliga sangarin í Tangz og varaløgmaður verða væl karikeraðir. Og Finnur Jensen líkist onkrum, sum er tikið beinleiðis úr Monty Python, tá hann hermir eftir einum fimleikara á oyggjaleikunum, sum ikki er so ávirkaður av jantulógini.

Tær báðar genturnar í kabaretbólkinum síggjast ikki serliga nógv á pallinum, men klára seg væl tá tær eru. Serliga oljudýradansurin hjá Sissal er minnisverdur.

Turpin og Gutti, ið eru teir mest rutineraðu í hópinum, eru nógv á pallinum og gera eitt gott arbeiði.

Tríggjar dansarinnur eru eisini við í kabarettini í ár, men tær hava tíverri næstan bara leiklutin sum pausuundirhald, meðan pallskiftini fara fram. Tær kundu væl verið tiknar meira við í sjálva kabarettina fyri at blása meira lív í onkra av skettsjunum.



*Gutti Winther í rekonstruktiónini av innbrotinum í Suðuroyar Sparikassa*
*Mynd: Jens K. Vang*



*Lisbeth »Lolita« Petersen*
*Mynd: Jens K. Vang*



# Kekkur til Reyða Kross Føroya



*Johan Mortensen, føroyskur umboðsmaður hjá oljufelagnum Anadarko, var týsdagin inni á gólvinum hjá Reyða Krossi Føroya, har hann handaði felagnum ein kekk, sum formaðurin, Suni Vinther, tók ímóti*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Oljufelagið Anadarko lat týsdagin Reyða Krossi Føroya ein kekk, sum skal brúkast til at heingja bjargingarkransar upp ymsastaðni í Føroyum**

PENINGAGÁVA
*Edvard Joensen*

**Tórshavn:** Oljuvinnan er eisini farin inn í trygdina við bryggjukantin. Reyði Krossur Føroya fekk týsdagin ein kekk frá oljufelagnum Anadarko. Peningurin verður brúktur til at heingja upp bjargingarkransar ymsastaðni í landinum.

Johan Mortensen, umboðsmaður hjá oljufelagnum Anadarko í Føroyum, var týsdagin inni á gólvinum hjá Reyða Krossi Føroya á Bryggjubakka í Havn, har hann handaði Suna Vinther, formanni í Reyða Krossi Føroya, ein kekk frá oljufelagnum.

Johan Mortensen segði, at tað var fyrrverandi leiðarin fyri føroysku deildini hjá Anadarko, Scott Albertson, sum hevði lagt merki til hetta ítakið, Reyði Krossur Føroya er farin undir, at heingja upp bjargingarkransar ymsastaðni, har fólk ferðast fram við sjónum. Albertson gjørdist so hugtikin av hesum, at hann helt, at oljufelagið átti at stuðla hesum tiltakinum peningaliga, og verður tað hervið gjørt, segði Johan Mortensen, tá hann handaði Suna Vinther kekkin.

Anadarko er eitt av feløgunum, sum hevur fingið tillutað boriloyvi á føroyskum øki, men hevur enn ikki søkt um loyvi at byrja sjálva leitingina.

## Fleiri kransar

Suni Vinther, formaður í Reyða Krossi Frøoya, takkaði fyri gávuna og segði, at hon kom væl við. Hon mundi røkka til at heingja einar seks til tíggju kransar upp, metti hann.

Hann helt fyri, at kekkurin frá oljufelagnum líkasum kundi virka sum ein troyst fyri ta miseydnaðu ólavsøkuna. Tá hevði Reyði Krossu Føroya ætlanir um at hava eitthvørt tiltak í Vágsbotni fyri at fáa pening til slík átøk sum tað við bjargingarkransunum. Men Vágsbotnur minti mest um eitt stað, har brúk var fyri bjargingarkransum orsakað av veðrinum um ólavsøkuna, so har kom einki burtur úr at savna pening, segði Suni Vinther.

Reyði Krossur Føroya hevur hongt bjargingarkransar upp ymsastaðni í Føroyum seinnu tíðina. Hongt verður upp á støðum, har nógv fólk ferðast. Bæði føroyingar og kanska serliga fremmand ferðafólk. Eitt nú í Koltri og Elduvík. Í Sandagerði og í Vágsbotni.

Hetta við at heingja upp bjargingarkransar á støðum, har nógv fólk fer um bryggjukantin, er ikki nakað nýtt í Reyða Kross samanhangi. Longu sama árið, sum Reyði Krossur varð stovnaður í Føroyum - í 1926 - samtykti nevndin at fara undir a tarbeiða fyri at betra um trygdina á føroysku havnarløgunum. Í gerðabókini hjá Reyða Krossi Føroya fyri árið 1926 sæst, at samtykt er at fáa til vega trígjar bjargingarhakar ..... »til ophængning ved de 3 mest benyttede landingssteder.«

Vikuskiftið undan ólavsøku vórðu tveir kransar hongdir upp við Leitisvatn. Annar við Gróthústanga og annar í Vatnsoyrum, meðan tann triði fer at verða hongdur upp við flúgvarabedingina. Har verður eisini ein bátshaki hongdur upp, sigur Suni Vinther.

Reyði Krossur Føroya hevur avtalu um at heingja ein krans upp við Rinkusteinar í Oyndarfirði. Eisini er avtalað við Viðareiðis Kommunu, at heingja upp á helluni niðan fyri kirkjuna á Viðareiði. Men har metir Reyði Krossur Føroya kortini, at Viðareiðis Kommuna eigur at gera onkrar ábøtur á lendið fyrst.

Eisini hevur Reyði Krossur hugt at umstøðunum úti í Fugloy, men einki er avgjørt enn, um ella nær nakar bjargingarkransur verður hongdur upp har úti, sigur Suni Vinther, formaður í Reyða Krossi Føroya.

# Útnorðurpeningur til Føroya

**Útnorðurgrunnurin hevur goldið út tvey lán til føroyskar fyritøkur í fjør. Trý nýggj lán eru játtað til komandi ár, stendur at lesa í ársfrágreiðingini, sum nýliga er almannakunngjørd**

ÚTNORÐURSAMSTARV
*Edvard Joensen*

Hálvtriðja millión danskar krónur vórðu í fjør útgoldnar føroyskum virkjum sum lán úr Útnorðurgrunninum. Í ár eru játtaðar sjey milliónir krónur til trý lán, sum tvey virki fáa, stendur í ársfrágreiðinini hjá útnorðutgrunninum, sum nýliga er almannakunngjørd.

Tvey føroysk fiskavirki, Norðís á Eiði og Lido Seafood í Skálavík, fingu ávikavist 800.000,- krónur og 1.700.000,- krónur útgoldnar í láni frá grunninum í fjør. Øll tøl eru givin upp í donskum krónum.

Umframt hesi bæði lánini vórðu tvey onnur lán útgoldin út grunninum í fjør. Tey fóru bæði til Grønlands, stendur at lesa í ársfrágreiðingini. Annað til hotelvinnu og hitt til flutningsvinnu.

Grunnurin letur lán til grønlendskar, íslendskar og føroyskar fyritøkur. Kortini verða lán bert játtað íslendskum umsóknum, um tær eru í samstarv við føroysk ella grønlendsk virki.

Ein slík umsókn varð játtað í fjør, men verður ikki útgoldin fyrr enn í ár, og er tí ikki við í roknskapinum fyri árið 2000.

Talan er um lán til eina íslendska fyritøku, sum arbeiðir við eini samstarvsætlan við eina føroyska fyritøku um turking av fiskaslógvi. Sum skilst er talan um virkið í Leirvík, sum turkar høvd og ryggir og flytir tey til Nigeria.

Í ár eru játtað trý lán til føroyskar fyritøkur. Samlaða lánsjáttanin í ár er upp á sjey milliónir danskar krónur. Lánini eru játtað tveimum fyritøkum. Einum fiskavirki og eini frystigoymslu, stendur í árfrágreiðingini hjá Útnorðurgrunninum.



*Norðís er annað av føroysku virkjunum, sum hevur fingið útgoldið lán úr Útnorðurgrunninum í fjør*

## Fiskur og ferðavinna

Føroyingar halda seg til fiskivinnuna, meðan grønlendingar rættiliga eru farnir at byggja ferðavinnuna út, skilst á ársfrágreiðingini hjá Útnorðurgrunninum.

Um fígging til Føroya verður sagt, at grunnurin í fjør hevur verið við til at fíggja fiskavirki í Føroyum. Bæði slík, har eigarvirðurskiftini eru broytt, og slík sum júst eru farin at virka.

Látið verður væl at føroyska búskapinum. Bæði hjá fiskivinnuni og fíggjarstovnunum gongur væl, verður sagt í ársfrágreiðingini.

Grønlendingar eru rættiliga farnir undir at byggja ferðavinnuna út. Útnorðurgrunnurin hevur latið lán til tiltøk innan ferðavinnuna bæði í Suður- og í Norðurgrønlandi. Arbeitt verður við at skapa fleri og fjølbroyttari tilboð til ferðafólk, sum koma til Grønlands. Infrastrukturururin verður betraður, eins og fleiri og fjølbroyttari gistingartilboð verða at fáa í Grønlandi í komandi tíð.

Íslendskum fyritøkum er ikki veitt lán í fjør, sigur ársfrágreiðingin frá. Tó er tann samstarvsætlanin, sum umfatar virkið í Leirvík, nevnd í árfrágreiðingini, hóast peningurin ikki verður goldin út fyrr enn í ár.

## Útlitini

Í framtíðini fer at verða arbeitt á sama hátt sum higartil. Latin verða lán til føroyskar og grønlendskar verkætlanir, meðan íslendskar fyritøkur bert skulu rokna við stuðuli, um samstarvað verður við føroyskar ella grønlendskar fyritøkur.

Í Føroyum verður tað enn sum fyrr fiskvinnan, sum fer at standa frammalaga. Men eisini ídnaðar- og handverksvinnan fer at verða prioriterað, sigur nevndin fyri Útnorðurgrunnin um framtíðarútlitini hjá grunninum.

Sami poltikkur sum higartil fer eisini at verða rikin í Grønlandi. Ferðavinnan stendur frammalaga, eins og ídnaður og handverk eisini fara at fáa part í komandi árum.

Fíggjarliga var árið eitt sindur tungt hjá Útnorðurgrunninum orsakað av gongdini á rentumarknaðinum. Men tað mól runt kortini, hóast ikki tær stóru upphæddirnar vóru at seta í grunnar.

Umsitingin hjá Útnorðurgrunninum telur 4,2 ársverk. 2,2 ársverk á høvuðsskrivstovuni í Reykjavík, meðan hini bæði eru ávikavist í Nuuk og í Tórshavn.

Stjóri í Útnorðurgrunninum er føroyingurin Sverri Hansen, sum starvast á høvuðsskrivstovuni í Reykjavík. Nevndarformaður er Sigurd Poulsen, landsbankastjóri.